VIÐMERKINGAR

# Ræðandi pseudo gudiligheit

**Finnur Helmsdal**
*tingmaður*



Uppskotið frá vinnunevndini, um at steingja fyri sølu av rundstykkjum og øðrum millum klokkan tíggju og tvey sunnudagar, er enn eitt dømi um ræðandi pseudo gudiligheitina, sum fær alt meira vald í samfelagi okkara. Um tað er sjúklig trongd at tekkjast ávísum veljaraskara, ella tað er ræðsla fyri sama skara, kann vera líka mikið. Tað, sum vit kunnu stað festa er, at ein stórur meiriluti av tinginum atkvøður fyri einum høpisleysum uppskoti, tí teir eru bangnir fyri hákirkjuligum- og øðrum veljarum. At man so við at samtykkja uppskoti ger seg inn á vanlig hampafólk og annars sendir eitt hykleriskt dupultmoralskt pseudo gudiligt signal úr tinginum, ja, tað má so vera harvið.

Um fólk sita á Hotel Føroyum ella á Hotel Hafnia klokkan hálvgum eitt sunnudagar og eta eina feitan fleskabita, sum verður skolaður niður við reyðvíni. Og um fólk hava drukkið eins snaps niðurundir, og fáa sær ein konjakk ella tveir omaná, ja, tað er ílagi, bara fólk ikki keypa rundstykki um somu tíð. Tað er, sambært tingsins hugburði, meira legalt at fara heim frá matstaði klokkan hálvgum tvey sunnudag við kenning, enn at fara ein fittan morguntúr klokkan ellivu við hundinum eftir rundstykkjum. Tað er ílagi, at vit keypa pittsa, Ekstrablaðið og skókrem klokkan 22.58 hvørt kvøld í vikuni (eisini sunnukvøld), men vit skulu ikki sleppa at keypa rundstykki sunnumorgnar aftan á klokkan tíggju.

**Ræðist pseudo gudiligheit**

Um ávísir tingmenn so fegnir vilja umskapa Føroyar til eitt fundamentalistiskt samfelag, so skulu hesir bara tóna reint flagg. Men tað hava teir sjálvandi ikki politikskt dirvi til. Teir velja heldur at lansera eina sjúkliga pseudo gudiligheit. Onkur kann siga, at tað kanska ikki er so vandamikið, at tað er gott, at vit fáa frið sunnumorgnar. Men tað skal eingin ivi valda um, at vit ganga vandaleið. Tí í tráð vit at menn lata seg lokka til at fremja ivasamar politiskar dispositiónir, m.a. tí lokal áhugamál skulu lúkast, so verður samvitskan reinskað við at spæla sjónleik fyri teimum hákirkjuligu. Og ein kann ikki lata vera við at hugsa ella bera bangheit fyri, hvør næsti leikur verður, tá hetta uppskotið er komið ígjøgnum. Skal tað tá verða bannað at lýsa við rundstykkjasølu, ella skal talið á bakaríðum avmarkast. Ella skal alt, sum bara minnir um morgunmata sunnudag bannast. Kári P syngur um rundstykkir í sanginum Súrligar nætur, kanska skal hann bannast... Tað næsta verður helst, at fólk skulu í kirkju ella á møti klokkan ellivu sunnudag. Hví ikki lata føroyingi sjálvan avgera, um hvussu hann skipar vikuskiftið. Bara hann ikki ger seg inn á onnur, so eigur tað at vera hansara persónliga val, um hann svevur leingi, hugnar sær við morgunmatarborðið saman við sínum, ella hann fer íkirkju ella á møti. Rokni ikki við, at nakar fær betri sømdi på den ene dag, um hann hevur keypt rundstykkini áðrenn klokkan tíggju sunnumorgun.

Viðgangi, at hesar viðmerkingar eru ógvusligar og argandi, kanska langt úti, sum vanliga verður tikið til. Men eru mínar viðmerkingar so langt frá líka langt úti, sum uppskotið um skerdu rundstykkjasøluna sunnumorgnar er. Haldi, tað er eitt tað mest skítbýtta, sum er lagt fyri tingið seinastu nógvu árini.

# Neyðars maður og kvinnan!

**Lena Jacobsen**

Harmist, at tað ikki eydnaðist Franki at vinna valið. Hann er so dugnaligur. Hevur verið so nógv ár í politikki. Og er so penur!

Tað verður torført hjá flokkinum at vera so royndan politikkara fyriuttan. Men familjan verður helst glað, tí hann við avgerð síni longu hevur beint fleiri forðingar av vegnum.

Undrist á, hví politikkarar ikki fingu tingmanning og floksleiðslu at velja formannin, tá tað er meira demokratiskt enn eitt limaval. Ella er tað minni demokratiskt?

Hví stóðu limadyrnar upp á víðan vegg framman undan valinum, so fleiri túsund limir kundu tekna seg aftrat? Sá eingin ”vandan” í hesum, men bara “vinning”?

**Helle kom, sá og sigraði**

Vónandi megnar hon at skilja millum ”mál” og ”bagatellir”. Millum politikk og politiskt ”viðfesti”. Millum seriøsar atfinningar og atfinningar, elvdir av, at hon er óroynd kvinna, ið bjóðar royndum manni av.

Sum tíðin líður, fáa vit at síggja, hvør stirðil er í henni. Um hon hevur vilja og umstøður at náa teim málum, hon ætlar. Lætt verður tað ikki hjá henni.

# Løgmaður til 13-tal

**Frank Davidsen**



Er tað nakað at siga til, teir tríggir løgtingslimir fólkafloksins vóru bæði lotir og lágmæltir í Degi og viku herfyri. Jørgen, sum vera man, kundi bert staðfesta, at tað var ein katastrofa fyri Vágar, um annar flogvøllur varð gjørdur, meðan landsstýrismaðurin í samferðslumálum var noyddur at viðurkenna, at tær 200 milliónirnar, ið løgmaður so hegnisliga hevði telvað við Anders Fogh um, vóru oyramerktar til Vága Floghavn.

Triði løgtingslimur fólkafloksins kendi seg á heimavølli og meinti, at fyri tær 200 mill. kundi man byggja ein nýggjan flogvøll fyri, ikki sannheit.

Vit onnur kunnu bert fegnast um tað hegni og samráðingarevni, ið løgmaður hevur víst í hesum máli. Serliga tá hugsað verður um ta oyðimarkargongd, ið skiftandi landsstýrismenn hava gingið í hesum máli.

Ringt er at spáa um framtíðina og ætlanirnar um ein annan flogvøll gerast veruleiki einaferð. Vit eru og verða ongantíð heimsins nalvi, og regulariteturin á Vága Floghavn er so gott sum tann sami sum í Kastrup.

Og hvør veit um skoðbráðið, ið løgmaður so hegnisliga veitti Vága Floghavn, kemur at hava við sær, at tøkniligi framburðurin komandi árini, saman við einum uppaftur betri regulariteti, ger at tað ikki verður neyðugt við eini milliarda íløgu í annan flogvøll. Livst so spyrst.

# Sólskinssøga í Danmark

**- órealistiskt og poppulistiskt í Føroyum**

**Sambandsflokkurin**
*Kaj Leo Johannesen*



Sitandi danska stjórnin hevur síðani hon tók við, fyri trimum árum síðani, arbeitt miðvíst við at stytta bíðilistarnar til sjúkraviðgerð í Danmark. Hetta hevur verið ein sólskinssøga, við tað at fleiri eru komin í viðgerð, bíðilistarnir eru styttir og sjúklingarnir eru nøgdir. Men tá Sambandsflokkurin roynir at tala fyri, at ein líknandi skipan eigur at verða sett í verk í Føroyum, so verður uppskotið kallað órealistiskt og populistiskt.

Talið av skurðviðgerðum á donskum sjúkrahúsum er økt við 70.000 um árið, síðani stjórnin setti sær sum mál, at eingin skuldi bíða í meira enn tveir mánaðar eftir viðgerð, og 42.000 fólk hava tikið av tilboðnum um at fáa viðgerð uttanlands ella á privatum sjúkrahúsum. Næsta stigið hjá stjórnini verður at stytta bíðilistarnar heilt niður í ein mánað.

Hetta ber væl til í Danmark, og hetta eigur sjálvsagt eisini at bera til í Føroyum.

At tað kostar nógv at fáa eina tílíka skipan at virka, er einki at ivast í, men í longdini vinna vit í hvussu so er ein stóran part av útreiðslunum innaftur, við tað at fólk verða styttri frá arbeiði vegna sjúku.

Vit kunnu lýsa hetta við einum einføldum dømi:

Ein persónur skal hava sjúkraviðgerð, og er fyribils óarbeiðsførur. Men av tí at bíðitíðin til viðgerðina er long, má hann ganga fyri einki í langa tí, hóast sjálv viðgerðin kann avgreiðast eftir stuttari tíð. Tá hann so endiliga kemur í viðgerð, er hann orsøk til at onnur noyðast at bíða. Úrslitið er, at tað alla tíðina gongur onkur og bíðar.

Um vit stytta bíðilistarnir, so merkir tað, at nógv fleiri sjúklingar fáa viðgerð ta tíðina meðan bíðilistarnir minkað, og tað hevur sjálvsagt øktar útreiðsla við sær. Men í somu løtu sum bíðilistarnir eru burtur, lækkar talið av viðgerðum niður aftur á umleið sama støði sum í dag. Munurin er bara, at tá gongur eingin óarbeiðsførur og bíðar eftir viðgerðini. Almennu útreiðslurnar til sjúkraviðgerð lækka tí aftur, meðan inntøkurnar hjá landskassanum hækka, tí fólk koma skjótari út aftur í arbeiðslívið.

So alt í alt hevði hetta í fyrsta umfari verið ein útreiðsla, men í longdini kundu vit vunnið ein stóran part av útreiðsluni innaftur, og fram um alt, so høvdu vit havt nøgdar sjúklingar - nakað sum ikki skal undirmetast.

Hetta er ein sólskinssøga í Danmark, hví skal tað so ikki eisini bera til í Føroyum ?

Líka so væl sum vit verða noydd at senda sjúklingar av landinum meðan bíðilistarnir minka, so kunnu vit eisini bjóða útlendskum sjúklingum at fáa viðgerð í Føroyum, tá bíðilistarnir einaferð eru burtur.

Tað undrar meg, at uppskot Sambandsflokssins hevur verið kallað órealistiskt og populistiskt, men líkamikið hvat onnur siga um tað, so ætlar Sambandsflokkurin kortini at stríðast fyri, at bíðilistarnir til sjúkraviðgerð í Føroyum innan 3 - 4 ár verða styttir niður til í mesta lagi tveir mánaðar.